## DAGSINS MEINING

# Vantandi tign á merkisdegi

Góða ólavsøku! Ynskja fólk. Á sama hátt! Svara vit aftur. Ja, vit eru komin til árliga ballið - tjóðarhátíð okkara. Veitrandi Merkið og candyfloss. Føroyskur dansur og heitar pylsur. Kappróður og full fólk. Møti og ballónir, sum fara til himmals. List og Frelsunarherurin. Mungát og Jolly. Fittar diddur og fittir beiggjar í føroyskum búna. Fótboltur, samstundis sum eydnuhjólið snarar í KFUM.

Og mitt í hesum hásummarmeldri, við síðum og gestablídni, ganga prestar og løgtingsmenn skrúðgongu, við løgmanni, løgtingsformanni og bispi á odda. Oman í Havnar kirkju og niðan aftur í nýumvælda Løgtingshúsið. Og eftir hátíðarløtuna á Tinghúsvøllinum við sangi og kantatu skal okkara túsund ára gamla løgting setast. Kanska tað elsta tingið í heiminum!

Hetta er ein hátíðarlig løta. Ein tignarlig løta. Tað serliga við hendingini í ár er, at tað eru hálvtannað hundrað ár síðani, at danir aftur lótu føroyingar endurreisa tað aldargamla løgtingið, tó við sera avmarkaðum valdið. Tá hevði tingið ligið stilt í eini hálvthundrað ár. Føroyingar høvdu ikki havt nakað politiskt umboð. Landið varð stýrt úr Danmark, og stjórnarviðurskiftini vóru alt eftir, hvussu amtmenn og donsku embætismenninir vóru.

So við og við hevur føroyska tjóðin vunnið sær størri vald og víðari frælsi. Tað størsta framstigið kom við heimastýrislógini. Men løgtingið samtykti ífjør uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks. Verður gingið eftir hesum leisti, og annars eftir tí vilja, sum tykist vera í politisku flokkunum og í Føroya fólki, so hava føroyingar vunnið sær fult ella víðgongt tjóðarfrælsi, tá komið verður til næsta hornastein Løgtingsis.

Tíverri mugu vit ásanna - hóast tað sær hátíðarligt út - at lítil tign er yvir løgtingi og landsstýri í dag. Ein politisk orrusta tekur seg upp eftir eina aðra. Ósemja er millum samgonguflokkar. Trúvirðið hjá summum politikkarum er ikki høgt í metum. Grovar skuldsetingar eru ikki afturvístar, samstundis sum hóttan um stevning fyri ærumeiðandi skuldseting hvørvur í tóman heim.

Føroyar og føroyingar hava uppiborið eitt betri siðalag. Ikki minst eftir at kvinnur og menn, á sjógvi og á landi, hava arbeitt landið upp úr tí djúpu kreppu, sum av álvara tók dik á seg fyri 10 árum síðani. Sum rendi so mangt um koll og sendi mangan landsmann í tvungna útlegd, tí okkara samfelagsliga samhaldsfesti rakk ikki nóg langt.

Ólavsøkan broytir neyvan nakað. Men prátið, kenningin, dansurin, veitslulagið til minis um deyða Ólav hin Heilaga fær kanska onkran at rakna við, og ásanna, at nú mugu vit taka okkum saman, arbeiða betri saman, leggja niður garðar og mørk og virka fyri felagsskapinum hjá okkum øllum Føroya landi okkum øllum til sóma. Góða ólavsøku!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bergur prestur proklamerar succes fyri seg sjálvan í Dómkirkjuni á ólavsøku

**Ólavur Petersen**
*Argir*

Bergur Debes Joensen sigur seg ikki fara at leypa á nakran í ólavsøkuprædikuni. So far endliga ekkaleysur í kirkju á ólavsøku. Tú hevur jú prestsins orð fyri at koma snikkaleysur úr aftur kirkjuni.

Tað er lygn, tá prestur sigur ólavsøkugudstænastuna vera serstaka gudstænastu. Tí hann skal mæla tað, sum sannleikans andi í og við orðinum gevur honum at mæla, og vera trúgvur móti tí og ongum øðrum.

Annars er tað trongligt í røðini av prestum, sum eru bangnir fyri at fáa eitt sindur av sverti undir neglina á lítlafingri. Teir skulu jú skikka sær væl, bæði fyri fyri bispi, dómprósti – og ikki minst yvir fyri mentamálastýrinum. Smørið á breyðið skal jú helst vera tjúkkari sum árini ganga.

Jesus, kirkjunnar Harri, sum altartalvan í Dómkirkjuni so rámandi symboliserar, er júst *ikki* kendur fyri ikki at lata seg sverta fyri øll forbrydilsir mannaættarinnar.

# Val í úrtíð?

**Bjørn á Heygum**



**Ringar royndir**
Nýggja stýrisskipanarlógin, sum heimilar løgmanni einsamøllum at útskriva val uttan at spyrja nakran annan eftir, stóð sína roynd á fyrsta sinni undir valskeiðinum 1994 - 1998, tá Edmund Joensen sat sum løgmaður.

Ásannast má, at hesar royndir vóru út av lagi vánaligar. Táverandi løgmaður dugdi sær ikki hógv og skilti als ikki endamálið við hesi víttgangandi heimild. Øll minnast vit hvussu hann tók løgtingið sum gísla og av sínum eintingum í tíð og úrtíð hótti við at útskriva nýval gjøgnum alt valskeiðið, um hann ikki fekk trumfa sín persónliga vilja ígjøgnum. Persónliga nalvaskoðanin og vanvirðingin fyri løgmansembætinum gav seg eisini týðuliga til kennar, tá Edmund Joensen ein sunnumorgum tók øll á bóli við at útskriva nýval, fyri sama dag at krúpa aftur til krossin og avlýsa valið, bukaður uppá pláss av sínum egnu.

Áhaldandi hóttanirnar frá táverandi løgmanni hildu ikki uppat av hesi grund, men vóru ein áhaldandi kleppur hjá samgonguni, sum ongantíð fekk arbeiðsfrið og ongantíð visti um henni framhaldandi var lív lagað.

Tað var bara ein spurningur um tíð til her fór at enda gali og so var!

**Persónligt maktamboð**
Okkara løgmaður, sum hevði fingið litið uppí hendur at nýta hetta amboð við at útskriva nýval í úrtíð fyri politiskt at varðveita eina natúrliga javnvág millum lóggevandi og útinnandi vald gjørdi nú heimildina til eitt persónligt maktamboð, sum kundi misnýtast til at bert at tæna egnum politisku áhugamálum.

Ikki óvæntað gjørdi hann so knappliga bart í apríl 1998. Ein lokal persónlig ósemja við valfelagið í Eysturoynni hevði gjørt løgmann firtnan. Sum ein annar fornermaður smádrongur fór hann brótandi upp á tingsins røðarapall og boðaði frá, at nýval varð útskrivað við tí úrsliti, at alt politiskt virksemi helt uppat frá einumdegi til annan.

Øll eru samd um at hesin atburður var fullkomuliga skilaleysur og til lítlan ógvuliga lítlan sóma fyri løgmansembæti. Eisini var henda valdsmisnýtsla ein dyggur smeitur fyri nýggju skipanina, sum setti sítt álit til sakligheit og dømikraft hjá persóninum í landsins hægsta embæti.

**Løgmaður umboðar landsstýrið**
Politiska støðan í dag er orsaka av persónligum ósemjum heldur ótrygg um ikki heilt lík støðuni í valskeiðinum frá 1994 - 1998.

Tað avgerandi má tó vera, at persónlig viðurskifti ongantíð kunnu nýtast sum haldgott og forsvarligt grundarlag fyri at útskriva val í úrtíð.

Út frá meginregluni um javnvág í politisku skipanini og, at tað er landsstýrið, sum útinnandi vald umboðað av løgmanni, sum í veruleikanum hevur fingið hesa heimild, so má og skal løgmaður ongantíð nýta hesa heimild til bert egna vegna at útskriva nýval.

Mótvegis løgtinginum og Føroya fólki umboðar hann nevniliga landsstýrið og ongantíð seg sjálvan.

Kemur løgmaður í persónligar trupulleikar, so má hann taka avleiðingarnar á annan hátt enn Edmund Joensen, sum í smásinni og hevnisøku valdi at lata hetta ganga út yvir sitandi landsstýri og løgting .

Tað er tí at vóna, at virðingin fyri løgmansembætinum og stýrisskipanini verður varðveitt á ein slíkan hátt, at løgmaður í framtíðini bert útskrivar nýval í úrtíð, tá hetta er sakliga grundað í reint politiskum viðurskiftum og fullkomuliga uttan persónlig atlit.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507 tel. 333843
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hví ikki einskilja Fiskavirking ?

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna*
*Tjóðveldisfloksins*



Vinnupolitikkur hevur staðið á dagsskránni undanfarnu vikurnar og er tað serstakliga einskiljingin av Føroya Fiskavirking, ið hevur verið umrødd. Meðan samgonguflokkarnir hava gjørt greitt, at teir taka undir við einari varligari og gjøgnumskygdari einskiljing av Føroya Fiskavirking, so hava stóru andstøðuflokkarnir havt eina aðra støðu til málið. Formaður Javnaðarfloksins hevur boða frá, at hann metir tað verða "óðamannaverk" at einskilja Føroya Fiskavirking og at hann ynskir at varðveita fyritøkuna á almennum hondum. Sambandsflokkurin hevur sagt seg ikki vilja einskilja enn.

Eg taki als ikki undir við støðutakanini hjá serstakliga Javnaðarflokkinum og skal eg hervið í stuttum greiða frá, hví tað er skilagott at fara undir varliga einskiljing av eitt nú Føroya Fiskavirking.

**Hvat ?**
Framtaksgrunnurin eigur í dag vegna Føroya Landsstýri eitt nú Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu. Hetta eru fyritøkur, ið vórðu fíggjarliga bjargaðar av tí almenna undir kreppuárunum og harvið gjørdust almenn ogn. Tjóðveldisflokkurin og hinir samgonguflokkarnir vilja virka fyri, at hesar fyritøkur gerast privat vinnuvirksemi aftur.

**Hvussu ?**
Einskiljingin av almennu ognunum, ið fyrr hava verið privat virksemi, skal fara fram á varligan og gjøgnumskygdan hátt soleiðis, at øll fáa høvi at bjóða uppá hesar ognir og selt verður til hægsta prís. Tí verður nýggi føroyski virðisbrævamarknaðurin eitt gott amboð til at fremja einskiljingarnar.

Um eitt nú Føroya Fiskavirking ynskir ein sokallaðan "strategiskan partnara", hevur hesin møguleika at keypa ein stóran partabrævapart á jøvnum føti við onnur. Viðvíkjandi útlendskum kapitali, so kann hesin avmarkast um hetta verður ynskt. Eisini kann verða selt í stigum yvir eitt áramál.

Undir øllum umstøðum skal tryggjast, at føroyski skattgjaldarin, sum í dag m.a. eigur Føroya Fiskavirking - umvegis Føroya Landsstýri og Framtaksgrunnin - fær sum mest fyri hesa og aðrar fyritøkur.

**Hví ?**
Hví eigur at verða farið undir einskiljing av eitt nú Føroya Fiskavirking ?

**• Greiðar linjur millum privat og alment**
Tað er av alstórum týdningi, at vit fáa greiðar linjur millum alment og privat virksemið soleiðis, at vanligt vinnuvirksemi er privat meðan vanligar almennar tænastur eru almenn uppgáva. Neyðugt er, at tað er klárt hvør hevur ábyrgd og átekur sær vágan á ymisku økjunum.
• Leggjast kann afturat tænastur sum postverkið, telekervið og strandferðslan í Føroyum helst egna seg betur á almennum hondum, hóast hesar tænastur eru privatar í nógvum størri londum. Orsøkin er tann, at Føroyar eru eitt lítið land við lítlum íbúgvatalið sum ikki gevur grundarlag fyri umfatandi kapping á økjunum og tískil kann einskiljing av ymiskum tænastuvirksemi enda við privatum monopoli - tá heldur hava alment monopol.

**• Minni vági fyri tað almenna**
Hóast Føroya Fiskavirking í dag er ein fyritøka, ið gevur yvirskot, so er als ongin vissa fyri, at soleiðis verður í framtíðini. Av tí, at fyritøkan er almenn ogn, liggur vágin hjá tí almenna - hjá landskassanum. Hetta kann gerast sera óheppið og dýrt í ringum tíðum. Hesin vági verður fluttur yvir á privatar hendur við einskiljing av fyritøkuni.

**• Minni kappingaravlagandi virksemi**
Tá ið almennur peningur verður nýttur at at stuðla og keypa fyritøkur uttan at nakað avlop krevst afturfyri, hevur hetta eina kappingaravlagandi ávirkan. Stórtsæð allar privatar fyritøkur geva eigarum sínum fíggjarligt avlop, men hetta er ikki eitt krav fyri føroyskar almennar fyritøkur - Føroya Banki undantikin.

**• Frígeva bundin almenn virðir**
Eisini hevur tað almenna stórar peningarligar upphæddir bundnar í stóru almennu fyritøkunum. Landsstýrið hevur uml. 3,5 mia. (pr. 31. des. 2000) í eginkapitali í fyritøkum og av hesum er tað bert Føroya Banki (uml. 1,5 mia.), ið hevur goldið part av yvirskoti sínum til landskassan. Harvið hevur Landsstýrið bundið góðar 2 mia. í fyritøkum uttan at hesar íløgur geva nakað beinleiðis avkast av sær til landskassan. Hetta er peningur hjá føroyska skattgjaldaranum, ið kundi verið nýttur øðrvísi og meira gevandi. Við einskiljing av eitt nú Føroya Fiskavirking fær tað almenna sostatt møguleika at umsita henda pening á annan hátt.

**"Skilaverk" at fremja varliga einskiljing**
Ikki er neyðugt hjá tí almenna at reka privat vinnuvirksemi og harvið minka um privata virksemið í landinum, binda almenna fíggjarorku og átaka sær óneyðugan vága. Tí kann eg als ikki taka undir við Javnaðarflokkinum, ið metir tað verða "óðamannaverk" at einskilja eitt nú Føroya Fiskavirking. Hetta er hinvegin "skilaverk" um farið verður fram á varligan og gjøgnumskygdan hátt.




# Serframsýningin »Úr útlegd« letur upp

**TÍÐINDASKRIV**
*Føroya Fornminnissavn*

Leygardagin 27. juli letur upp serframsýningin "Úr útlegd" í hølunum hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni í Hoyvík.

Á framsýningini verða flest allir teir savnsgripir sýndir, sum danska tjóðsavnið nú letur Føroya Fornminnissavni sambært Samstarvsavtalu millum Føroya Fornminnissavn og Nationalmuseet frá 1999. Tó verða nakrir gripir, sum Føroya Fornminnissavn nú eigur, verandi á danska tjóðsavninum enn nøkur ár, m.a. tí teir har eru í brúki í framsýningum.

Í høvuðsheitum er framsýningin skipað eftir, nær og hvussu gripirnir vórðu savnaðir til tey søvn, sum nú eru danska tjóðsavnið. Fyrstu gripirnir, sum í 1819 vórðu savnaðir til Oldnordisk Museum, eru teir sum standa fyrstir í framsýningini, og síðstur stendur gripur, ið varð latin inn á danska tjóðsavnið so seint sum í 1966.

Soleiðis skipað fellur framsyningin náturliga í tveir partar.

Fyrri partur lýsir tey fólk, ið savnaðu og teir gripir, sum í 19. øld og nakað inn í 20. øld vórðu savnaðir til Oldnordisk Museum, Den Kongelige Danske Møntsamling og síðan 1890 til Nationalmuseets 2. Afdeling. Hesin partur verður sýndur fram í tveimum rúmum. Í fyrra rúminum er fyrst sýnd innsavningin í 1819 av føroyskum kirkjugripum hjá Vargas-Bedemar, greiva, síðan fjølbroytta innsavningin, sum Plöyen, fúti og amtmaður, framdi frá 1830-1844. Aðrir embætismenn, eitt nú Tillisch, amtmaður og Jákup Nolsøe, handilsforvaltari og ymsir føroyingar sum Schrøder, prestur og Pól á Látrinum sendu danska savninum nakrar fáar savnsgripir hvør og verða tí lýstir saman í bólki. At enda í hesum rúmi verður sýndur Føroya einasti skattafundur, sum M.A.Winther, sýslumaður á Sandi varnaðist í molddunga á kirkjugarðinum. Sandsfundurin er viðgitin millum myntgranskarar fyri sínar sjáldsomu og granskingarliga áhugaverdu myntir.

Í øðrum rúmi í fyrra parti (miðrúminum) verður sýnt tað víðagitna og nógv umrødda miðaldar innbúgvið úr Kirkjubøar kirkju, sum V.U. Hammershaimb, próstur og Hannes Finsen, amtmaður ansaðu eftir at fáa niður á savnið, tá brúk ikki longur var fyri tí í kirkjuni eftir umvælingina í 1874.

Her finna vit m.a. teir vøkru stólavangarnar, kendir sum kirkjubøstólarnir.

Annar partur lýsir tey, sum frá endanum av 19. øld og til 1966 hava latið savnsgripir inn til Dansk Folkemuseum, síðan 1920 Nationalmuseets 3. Afdeling - og tað, tey hava latið inn. Fyrsti innsavnarin var hin kendi Daniel Bruun, sum hevði alstóran týdning fyri alt savnsvirksemi í Útnorði, men eisini onnur hava latið savninum føroyskar gripir. Mangir danir, sum hava ferðast í Føroyum, hava arvað ella á annan hátt ognað sær føroyskar gripir, og føroyingar við, eitt nú Jóannes Patursson, Andreas Weihe og Hans Jacob Jacobsen. Tann, sum hevur savnað og latið Dansk Folkemuseum størsta talið av gripum og best lýstu, er eiðislæknin R. K. Rasmussen, sum tí eigur stóran part av hesi framsýning.

Serframsýningin endar við gripi, sum abbasonur Høst, sorenskrivara lat danska tjóðsavninum so seint sum í 1966. Hetta er borðbátur, fult útgjørdur og við øllum fiski- og grindareiðskapi. Høst var sorenskrivari í 1870 árunum, og gevur borðbáturin tí eina einastandandi tíðarmynd av báti, útgerð og reiðskapi.

Um ólavsøkuna er serframsýningin opin leygardagin, ólavsøkuaftan, ólavsøkudag og týsdagin 30. juli, allar dagar millum kl. 14 og 20.